# Orðalisti skal tryggja eitt gott oljumál

**Til tess at kunna møta eini av nýggju avbjóðingunum frá eini komandi oljuvinnu hevur í eina tíð verið arbeitt við at gera ein oljuorðalista. Hesin er nú veruleiki og er tøkur á alnótini**

OLJUMÁL
*Jan Müller*


*Herálvur Joensen, aðalstjóri, og Jógvan í Lon, sum tóku stig til ein oljuorðalista*

Orðalistin er úrslit av samstarvi millum fýra partar: FOÍB, t.e. Føroya oljuídnaðarbólkur, Oljumálastýrið, Føroysku málnevndina og Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya.

Oljuvinna hevur verið tað stóra samrøðuevnið millum manna tey seinastu árini. Og søgan um, hvussu henda verkætlan við oljuorðalistanum kom í lag, er meira at kalla ein tilvildarlig hending stendur á lesa á heimasíðuni hjá Málnevndini.

Formaðurin fyri Føroysku málnevndini var á fundi saman við aðalstjóranum í Oljumálastýrinum um okkurt heilt annað evnið, tá ið prátið fall á olju og oljuvinnu. Hetta var á sumri 2001. Tá spyr aðalstjórin, um tað ikki hevði verið eitt gott hugskot at farið undir at gjørt ein oljuorðalista, tí henda nýggja vinnan – um hon gjørdist verulig vinna – fór at krevja nógv nýggj føroysk orð, tí vit høvdu ikki tey neyðugu orðini: okkum vantaði orð og heiti á nógvum ymsum lutum og fyribrigdum, sum nýtt vórðu á hesum øki. Aðalstjórin visti av royndum, hvussu trupult tað var at orða seg á góðum føroyskum, tá ið skrivast skuldi um oljuvinnuna. Oljuvinnan er sum flestum kunnigt ógvuliga nógv ávirkað av enskari málnýtslu.

Tanki verður til verkætlan

Tá ið hetta prátið var í Oljumálastýrinum, vórðu oljufeløgini farin undir at bora, og føroyingar vóru á gosi, tí nú var oljuvinnan knappliga komin okkum heilt nær, og tað var ikki dagur, at fjølmiðlarnir ikki bóru tíðindi um oljuvinnu á føroyskum øki. Málnevndarformaðurin tók sjálvandi undir við hugskotinum um ein oljuorðalista, tí málnevndin hevur eisini sum endamál at menna føroyskt sum yrkismál á so mongum økjum sum gjørligt, tí júst yrkismálið er við til at fullfíggja føroyskt sum samskiftisamboð. Aðalstjórin skuldi á fund við umboð fyri Amerada Hess og FOÍB stutt eftir, og tá skuldi hann royna at fáa FOÍB við í ætlanina. Og har varð tikið væl ímóti verkætlanini. Síðani var fundur millum málnevndarformannin, aðalstjóran í Oljumálastýrinum og umboð fyri FOÍB, og tá gjørdist tankin til eina veruliga verkætlan, sum byrjaði í oktober og skuldi vera liðug 1. mai 2002. FOÍB og Oljumálastýrið fíggjaðu verkætlanina. Ritstjóri varð settur og ein stýrisbólkur hevur verið ritstjóranum til hjálpar í arbeiðinum við orðalistanum. Ritstjóri var Jóhan Hendrik W. Poulsen, og stýrisbólkin mannaðu Sigurð í Jákupsstovu fyri FOÍB, Herálvur Joensen fyri Oljumálastýrið og Jógvan í Lon Jacobsen fyri málnevndina/Føroyamálsdeildina. Føroyamálsdeildin hevur hýst verkætlanini, og stýrisbólkurin hevur havt sínar fundir á deildini.

### Á føroyskum

Endamálið við listanum sigur føroyska málnevndin, er at fáa til vegar føroyskt orðatilfar, soleiðis at tá ið føroyingar tosa og skriva um oljuvinnu og fjølmiðlarnir viðgera hana, so skal tað kunna gerast á føroyskum. Eisini verður miðað ímóti at fáa til vegar eina eintýdda málnýtslu á hesum øki frá byrjan og samstundis royna at forða fyri málsligum økismissi á hesum yrksiøki. Eitt ikki minni týdningarmikið endamál er at koma á tal við brúkaran og fáa hansara meiningar um orðatilfarið, og stýrisbólkurin vónar, at fólk fara at nýta henda møguleika at ávirka málnýtsluna og gera vart við sínar hugsanir um málnýtsluna á oljuøkinum.

Orðatilfarið í listanum er fingið úr føroyskum bókum og ritum, sum snúgva seg um olju. Ritstjórin hevur orðtikið lógir, kunngerðir, Frágreiðing frá oljuráðleggingarnevnd landsstýrisins og GEM-frágreiðingina. Eisini eru oljuorð úr tøkniorðabókini, sum er í gerð á Føroyamálsdeildini, tikin uppí her. Harumframt er ein stórur partur av oljuorðalistum, sum Phillips Petroleum Company gav út í 1980, týddur til føroyskt. Til samans eru stívliga 1000 føroysk yrkisorð í listanum, sum er býttur sundur í tveir partar. Annar parturin hevur føroysk leitorð, og annar ensk leitorð. Frá teimum ensku leitorðunum verður víst til tey føroysku orðini, har skilmarkingin stendur. Viðmerkt eru stundum donsk og stundum norsk samdømi. Tey orðini, sum eru týdd úr orðalistanum hjá Phillips, hava ensk og norsk javndømi, meðan orðini úr teimum føroysku keldunum hava donsk samdømi, tikin úr donsku týðingini av frágreiðingini frá oljuráðleggingarnevndini.

### Væl mótikin

Nú hesin listi verður lagdur út á alnetið, er tað í teirri vón, at almenningurin tekur væl ímóti honum. Hesin listi er ikki at rokna sum nakað endaligt úrslit, men sum ein fyrsta roynd at evna til ein orðalista á hesum øki, og tí er listin sjálvandi merktur av. Hóast listin inniheldur stívliga 1000 leitorð, so fer sjálvsagt sum frá líður at verða tørvur á fleiri orðum, og vónandi fara fólk at gera vart við tað og vísa á, hvat vantar og hvat kundi verið øðrvísi og betri. Vónað verður, at heimasíðan verður nógv vitjað, soleiðis at brúkararnir kunnu seta sín dám á orðalistan.

Stigtakararnir siga annars, at henda verkætlan er dømi um eina væleydnaða verkætlan, har samstarvið millum tann tøkniliga og tann málsliga partin hevur virkað sera væl, og vónandi kann listin koma fólki til góðar, sum skal orða seg á føroyskum. Tað er eisini teirra vón, at fólk fara at lata frætta frá sær um møguligar batar, ábøtur og dagføringar sigur stýrisbólkurin, sum við hesum leggur oljuorðalistan fram fyri almenningin, fyribils á alnótini. Enn er ov tíðliga at geva hann út í bók. Men tað kemur helst eisini.


*Jóhan Hendrik W. Poulsen, sum hevur verið ritstjóri fyri oljuorðalistan*

Ingun Simonsen:

# Eg eri sera stolt av úrslitinum

**– Nú er mín missión í skopun liðug, sigur Ingun Simonsen, sum nú er koyrd frá sum fyrstilærari í Skopun**

SKÚLASTRÍÐ
*Àki Bertholdsen*

– Eg havi brúkt fimm ár av mínum lívi uppá Skopunar skúla og havi arbeitt við lív og sál. Eg síggi tað soleiðis, at nú er mín missión liðug og eg eri sera stolt av úrslitinum.

Hetta sigur Ingun Simonsen, sum nú er koyrd frá sum fyrstilærari í Skopun, í tíðindaskrivi, hon hevur sent fjølmiðlunum seinnapartin týsdagin.

Seinastu árini hava stórir trupulleikar verið í skúlanum í Skopun og teir endaðu fyrr í vikuni við, at Ingun Simonsen varð flutt í Hoyvíkar Skúla og ein annar lærari, Sigurd Bærentsen, verður fluttur í Miðskúlan á Sandi

– Eg havi tikið avgerð um at verða flutt í annað starv, tí eg vil hava frið, bæði fyri meg sjálva og ikki minst fyri mína familju, sum hóast alt hevur stórstan týdning fyri meg, sigur Ingun Simonsen í tíðindaskrivi.

– Eg havi fingið starv í Hoyvíkar skúla og tað gleði eg meg til, tí eg havi bert hoyrt alt gott um skúlan og kenni meg vælkomna. Eg skal í øllum førum gera mítt til, at samstarvið millum meg, børn, foreldur og starvsfelagar verður gott.

Hon sigur, at hon hevur fingið góðar sømdir, við tað, at hon fær loyvi at útbúgva seg víðari og hon hevur eisini fingið rættiliga fitt í niðurskurði á skúlanum, so at hon færhøvi at lesa. Harafturat fær hon somu løn sum nú.

### Ikki allur sannleikin

– Tá ið ført hevur verið fram, at ósemjan um Skopunar skúla er ímillum meg og ein lærara, er hetta ikki allur sannleikin, sigur Ingun Simonsen í tíðindaskrivinum.

– Men hetta hevur onkur valt at kalla tað og tað má so standa fyri teirra egnu rokning. Hetta er ein trupulleiki, sum stingur nógv djúpari og hevði eg havt heimildir sum leiðari at loyst knútin, hevði eg ikki valt henda háttin, tí væntast kann, at trupulleikin fer at halda fram í fleiri ár aftrat. Skal ein tílík ósemja loysast, er neyðugt, at fólkið, ið skal loysa ósemjuna, er staðkent og veit hvat fyriferst, eisini úti á síðulinjuni.

Ósemjan var har heilt greitt áðrenn eg varð sett í starv 1997, hetta søgdu embætisfólk í Landsskúlafyrisitingini og Landsstýrinum mær fleiri ferðir og ávaraðu meg um, at eg fór at fáa tað trupult. So sigast kann, at eg visti hvat eg gekk inn til.

Hon sigur eisini, at játtanin til skúlan var sera lítil, tá hon kom, einans 7000,00 kr. Hon hevði ligið millum 2000,00 og 7000,00 kr. í fleiri ár.

– Í dag hevur skúlin eina játtan, ið svarar til einar 1800,00 kr. pr. næming bert til undirvísingartilfar, harafturat er peningur játtaður til onnur endamál á skúlanum, so sigast kann, at í so máta er skúlin sera væl fyri í dag, hóast hann er alt, alt ov lítil.

– Skúlin er eisini væl útgjørdur nú við øllum nútímans amboðum og hann er gjørdur í stand fyri nógvar hundrað túsund krónur. Har var bert eitt wc, tá ið eg kom, nú eru fimm. Lærararúm var ikki á skúlanum, nú hava vit eitt sera hugnaligt lærararúm og eina skrivstovu til leiðaran.

### Børnini glað

– Pedagogiska linjan í dag er ein heilt onnur, enn tá ið eg kom. Børnini eru glað og hava sjálvi ávirkan á sína undirvísing, tey hava nøkur virði, sum eg trúgvi ongantíð kunnu takast aftur frá teimum, sama, hvat nú fer at henda.

–Og tey kenna síni rættindi sum menniskju og rættindini hjá øðrum við og tað er í mínari verð sera týdningarmikið, skalt tú fáa nakað burtur úr undirvísingini og hava eina góða barlast við tær út í lívið.

– Nýggja Fólkaskúlalógin er eisini ein partur í hesi ósemjuni. Lógin er eftir mínum tykki óhóskandi fyri okkara lílta land, hugt hevur verið ov nógv eftir, hvussu tey gera í Danmark, heldur áttu vit at hugt eftir t.d. íslendsku lógini, tí okkara mentan líkist meir og smíða eina lóg, sum hóskar til føroysk viðurskifti. Nógv gott er eisini við lógini, men hon er alt ov trupul at umsita.

– Tað verður alla tíðina ført fram, at peningur ikki er játtaður í nóg stóran mun. Men hetta er ikki einasti sannleikin. Lógin er so umfatandi, at ikki bert lærarar og leiðslur skulu mennast og útbúgvast, men so sanniliga eisini foreldur, kommunustýri og onnur við mugu fáa nógv meira vitan enn tey hava nú.

– Tað sum fer fram nú, er ikki minni enn ein stór kollvelting og tá rulla høvd, tað vita vit, sigur Ingun Simonsen í tíðindaskrivinum.



# Útselt til Stig Rossen

**Seinna konsertin hjá danska musical-sangaranum Stig Rossen er longu útseld, og bert fá av teimum 400 atgongumerkjunum til fyrru konsettina vóru eftir um middagsleitið í gjár.**

JAZZFESTIVALUR
*Rúnar Reistrup*



*Eftir at jazzfestivalurin er fluttur úr Norðurlandahúsinum hevur tað eydnast betur at seta festivaldám á Havnina, heldur Brandur Øssursson.*

Brandur Øssursson hevur á 19. ári tikið stig til at skipa fyri Jazz-, Fólka- og Bluesfestivalinum, men enn kann hann verða tikin á bóli av áhuganum fyri teimum ymsu konsertunum á festivalinum. Onkuntíð livir áhugin als ikki upp til vónirnar, og aðrar tíðir er áhugin væl størri enn man skuldi trúð, og hetta hevur Brandur upplivað í ár, nú atgongumerkjasølan til høvuðsnavnið á festivalinum hevur gingið betur enn fyrireikarin hevði droymt um.

- Vit eru enn ikki komin so langt sum til at lýsa við festivalinum, men longu nú er útselt til fyrstu konsertina, og atgongumerkini eru av álvara um at ganga undan til seinnu konsertina, sigur Brandur Øssursson.

Tað ger ikki undran hansara minni, at atgongumerkini til konsertina við Stig Rossen eru nakað væl dýrari, enn atgongumerkini til konsertina hjá høvuðsnavninum á festivalinum plaga at vera.

- Tað sær ikki út til at atgongumerkjaprísurin hevur stygt fólk burtur, og tað er bara at gleðast um, tí tað er ikki bíligt at fáa so stór nøvn hendanvegin, sigur Brandur Øssursson.

### Fluttur úr Norðurlandahúsinum

Stig Rossen hevur tvær konsertir mikudagin 3. juli. Tann fyrra verður kl. 17.00 og tann seinna kl. 20.00. Seinna konsertin er longu útseld, og til fyrru konsertina eru bert heilt fá atgongumerki eftir. Konsertin verður í Norðurlandahúsinum, har pláss er fyri eini 400 fólkum til hvørja konsert.

Mikukvøldið er einasta kvøldið at Jazzfestivalurin heldur til innanfyri veggirnar í Norðurlandahúsinum, har hann annars plagdi at halda til hvørt kvøld fyrr.

Men tá Norðurlandahúsið í fjør tók stig til at skipa fyri einari árligari listastevnu, var ikki longur pláss fyri Jazzfestivalinum í húsinum. Ætlanin var upprunaliga at leggja tann tá 17 ára gamla Jazzfestivalin í endaliga hvíld í fjør, men tá Listastevna Føroya byrjaði at taka skap, gjørdist tað Brandi Øssurssyni greitt, at hon ikki kundi fylla holið eftir Jazzfestivalin, og tí varð avgjørt at halda fram við festivalinum.

### Broytingar neyðuguar

Broyttu umstøðurnar noyddu Jazzfestivalin at ganga nýggjar leiðir. Festivalurin flutti út úr Norðurlandahúsinum og breiddi seg út yvir onnur støð í Havnini, eins og festivalurin varð fluttur tíðarliga frá august mánað til juli fyri ikki at fella saman við nýggju listastevnuni. Høvuðsfyrireikarin er væl nøgdur við tað nýggja skapið, sum festivalurin hevur fingið.

- Eg haldi sjálvur at Jazzfestivalurin var stagneraður eitt sindur seinastu árini í Norðurlandahúsinum. Vit dugdu ikki nóg væl at koma út millum fólk við tiltøkunum, og tí setti festivalurin ikki tann dám á býin, sum ein væl eydnaður festivalur skal gera. Nú breiða tiltøkini seg um allan býin og tað merkist á Havnini, tá Jazzfestivalurin er í gongd, sigur Brandur Øssursson.

At flyta festivalin fram til tíðliga í juli mánað hevur eisini víst seg at vera væleydnað, tí tá liggur hann tætt at stóru jazzfestivalunum í Danmark og hinum grannalondunum. Tí er nógv lættari nú at fáa stórnøvnini frá øðrum festivalum at leggja leiðina fram við Føroyum, sigur Brandur. Soleiðis kemur millum annað ein New Zealendskur bólkur nevndur The Jew Brothers Band á Jazzfestivalin, tí hann er í Danmark um tað mundið í sambandi við ein annan jazzfestival.

### Minni føroyskt

19. Jazzfestivalurin líkist rættiliga nógv sær sjálvum í mun til í fjør, men nógvar royndir ríkari hevur Brandur Øssursson gjørt av at broyta okkurt. Í fjør varð fyri fyrstu ferð roynt at hava tónleikatiltøk í Sjónleikarhúsinum, men tað eydnaðist ikki væl at fáa áhoyrarar til hesar konsertir. Tískil er Sjónleikarhúsið mestsum tikið burturúr skránni hesaferð, meðan fleiri konsertir vera í Listaskálanum og á Gamla Meiarínum, sum í fjør vístu seg at vera væl umtókt millum áhoyrararnar.

Harumframt er størsta broytingin í mun til í fjør, at talið á luttakandi føroyskum bólkum er minkað nógv. Í fjør var umleið helvtin av konsertunum spældar av føroyskum bólkum, men í ár eru bara nakrar fáar føroyskar konsertir.

19. Jazz-, Fólka- og Bluesfestivalurin byrjar týsdagin 2. juli við konsertum umborð á Norðlýsinum, á gongugøtuni, í Listaskálanum og Í Kagganum. Festivalurin takkar fyri seg við einari umfatandi skrá leygardagin 6. juli.


*Navnframi danski musical-sangarin Stig Rossen, sum á Jazzfestivalinum fyrst og fremst fer at framføra løg úr Les Miserables, er eftir øllum at døma væl dámdur millum føroyingar.*

## Barakkin má víkja fyri nýggjum skúla

Farið verður nú undir at byggja nýggjan smábarnaskúla til Tórshavnar Kommunuskúla. Bygt verður har tann sonevnda Barakkin stendur í dag. Arkitektavirkið Árni Winther hevur teknað nýggja skúlan, sum eftir skúlasummarfrítíðina í 2004 skal hýsa 1., 2. og 3. flokki á Kommunuskúlanum.

Skúlabygningurin verður í tveimum hæddum og fer at telja seks skúlastovur umframt, lærarahøli, goymslurúm og tvey felagshøli.

Nýggju skúlastovurnar til tey smæstu skúlabørnini í Kommunuskúlanum verða innrættaðar soleiðis, at tær liva upp til ásetingarnar í nýggju fólkaskúlalógini, sigur Tórshavnar Býráð í tíðindaskrivi.

## KFUK skótar á danska landslegu

Í dag fara 40 føroyskir skótar á landslegu hjá donsku KFUK skótunum. Legan, ið kallast Alle tidders lejr 2002, verður hildin 5. hvørt ár. Í ár verður hon í býnum Sundstrup nærhendis Skive í Jútlandi.

Føroysku skótarnir fóru niður til Danmarkar sunnudagin, og hava gist í einum skótahúsum nærhendis Silkeborg, áårenn teir løgdu leiðina á stóru leguna.